## Newcastle vildi hava Calderwood

Colin Calderwood, sum eftir øllum at døma verður næsti landsliðsvenjari oikkara í fótbólti, segði týsdagin sagt nei takk til eitt starv í enska stórfelagnum Newcastle. Tað vita enskir fjølmiðlar at siga. The Mirror vildi vera við, at Colin Calderwood skuldi í starv sum hjálparvenjari í Newcastle, men hetta avsannar Calderwood sjálvur. Sum skilst frá keldum í Skotlandi er tó ikki heilt einki um søguna, hóast hon verður avsannað.




## Juventus vil hava Kuyt

Sambært enska the Sun er italska Juventus til reiðar at rinda £30 milliónir fyri hollenska Dirk Kuyt, sum spælir við Liverpool. 28 ára gamli Kuyt hevur skotið fimm mál í 22 dystum fyri Liverpool hetta kappingarárið. Men hóast málini kanska ikki eru so heilt nógv í tali, so hevur hann støðugt imponerað vil velduga arbeiðsavriki sínum.

# Danmark hevur 4 stig við sær

**Noreg mátti lúta fyri Danmark, og Svøríki mátti lúta fyri Kroatia.**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Norðurlendska HM-granna-uppgerðin millum Danmark og Noreg endaði við einum 32-28 sigri til Danmark, sum sostatt tekur 4 stig við sær til millumumfarið. Norðmenn fara stigaleysir víðari til millumumfarið, meðan Serbia hevur 2 stig, aftaná 27-26 sigurin á Noregi ígjár. Norðmenn vónaðu, at Brasilia fór at sigra á Egyptalandi. So hevði Brasilia fari fram um Serbia, og Noreg hevði fingið bæði stigini, sum vóru vunnin ímóti Brasilia við sær í millumumfarið. Brasilia tapti 25-22.

Størsti munurin millum Danmark og Noreg vóru Kasper Hvidt í málinum, og Mikkel Hansen. Kasper Hvidt hevði, sum so mangan áður nógvar góðar bjargingar. Steinar Ege stóð ikki illa í norska málinum, men Kasper Hvidt hevði munin. Kristian Kjelling skeyt 9 mál fyri Noreg, og gjørdi sítt fyri at halda teir inni í dystinum. Men tann, sum stjól myndina var tað unga danska supertalentið Mikkel Hansen, sum skeyt 10 mál. Dalibor Doder og Jonas Larholm gjørdu sítt fyri at halda Svøríki inni í dystinum ímóti Kroatia í bólki B. Teir skutu 7 mál í part, men Kroatia vann bólkafinaluna við 30-26, aftaná at hava verið á odda 14-13 í hálvleikinum.




*Mikkel Hansen skeyt ikki færri enn 10 av málunum, tá Danmark í gjár vissaði sær oddasessin við sigri á Noreg*
*Mynd: Polfoto*

### Úrslitini hósdagin:

**Bólkur A:**
Frakland-Ungarn 27-22
Slovakia-Rumenia 28-23
Argentina-Australia 36-16

**Bólkur B:**
Spania-Suðurkorea 23-24
Kuwait-Kuba 23-26
Kroatia-Svøríki 30-26

**Bólkur C:**
Makedonia-Russland 36-30
Týskland-Pólland 30-23
Tunesia-Algeria 36-25

**Bólkur D:**
Danmark-Noreg 32-28
Egyptaland-Brasilia 25-22
Serbia-Saudi Arabia 38-29

# Claus er givin

**Costin Dumitrescu hevur fyribils tikið við venjingini av besta mansliðnum hjá StÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri tveimum vikum síðani fráboðaðu StÍF og Claus Rasmussen, at samstarvið millum partarnir ikki helt fram.

Nú boðar felagið á heimasíðu sínari frá, at avgerðin um at steðga samstarvinum er framskundað, og at Claus Rasmussen gevst her og nú.

Í hansara stað hevur StÍF fingið Costin Dumitrescu at standa á odda fyri liðnum. Costin Dumitrescu var spælandi venjari, tá StÍF vann FM-heitið í 2005, men hann flutti tá aftur til Rumenia í eina tíð. Síðani hevur tað verið við tilknýti til Tjaldur, at hann hevur virkað, men nú skal hann royna at toga avrikini hjá StÍF uppeftir.

Claus Rasmussen leiddi í fjør StÍF til silvur í bæði lands- og steypakapping, men mannfallið hevur verið stórt í hesum kappingarárinum, og hóast teir vóru væl við fyrsta partin av kappingini, so hava úrslitini sveiggjað ov nógv, til at liðið veruliga kundi gera seg galdandi.



*Claus Rasmussen er nú fyrrverandi venjari hjá StÍF. Hann sigur við heimasíðuni hjá felagnum, at hann nú fer at taka sær meira tíð saman við familjuni, eftir at hann hevur verið hondbóltsvenjari 17 ár á rað*

**HM-støðurnar**

**Bólkur A**

| | | d | v | j | t | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Frakland | 5 | 5 | 0 | 0 | 168-106 | 62 | 10 |
| 2 | Slovakia | 5 | 3 | 1 | 1 | 152-119 | 33 | 7 |
| 3 | Ungarn | 5 | 3 | 1 | 1 | 148-115 | 33 | 7 |
| 4 | Rumenia | 5 | 2 | 0 | 3 | 141-135 | 6 | 4 |
| 5 | Argentina | 5 | 1 | 0 | 4 | 133-137 | -4 | 2 |
| 6 | Australia | 5 | 0 | 0 | 5 | 76-206 | -130 | 0 |

**Bólkur B**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kroatia | 5 | 5 | 0 | 0 | 170-115 | 55 | 10 |
| 2 | Svøríki | 5 | 4 | 0 | 1 | 162-118 | 44 | 8 |
| 3 | Suðurkorea | 5 | 3 | 0 | 2 | 140-126 | 14 | 6 |
| 4 | Spania | 5 | 2 | 0 | 3 | 167-127 | 40 | 4 |
| 5 | Kuba | 5 | 1 | 0 | 4 | 106-181 | -75 | 2 |
| 6 | Kuwait | 5 | 0 | 0 | 5 | 99-177 | -78 | 0 |

**Bólkur C**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Týskland | 5 | 4 | 1 | 0 | 147-116 | 31 | 9 |
| 2 | Makedonia | 5 | 3 | 0 | 2 | 145-136 | 9 | 6 |
| 3 | Pólland | 5 | 3 | 0 | 2 | 146-131 | 15 | 6 |
| 4 | Russland | 5 | 2 | 1 | 2 | 143-145 | -2 | 5 |
| 5 | Tunesia | 5 | 2 | 0 | 3 | 143-142 | 1 | 4 |
| 6 | Algeria | 5 | 0 | 0 | 5 | 114-168 | -54 | 0 |

**Bólkur D**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Danmark | 5 | 5 | 0 | 0 | 167-121 | 46 | 10 |
| 2 | Serbia | 5 | 3 | 0 | 2 | 161-146 | 15 | 6 |
| 3 | Noreg | 5 | 3 | 0 | 2 | 162-123 | 39 | 6 |
| 4 | Egyptaland | 5 | 2 | 0 | 3 | 110-126 | -16 | 4 |
| 5 | Brasilia | 5 | 2 | 0 | 3 | 128-158 | -30 | 4 |
| 6 | Saudi Arabia | 5 | 0 | 0 | 5 | 107-161 | -54 | 0 |